www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 12 - 2011

# OPEC ásetir nýtt framleiðsluloft

OPEC, felagsskapurin av oljuframleiðandi londum, hevur gjørt av at áseta eitt framleiðsluloft uppá 30 milliónir tunnur av olju um dagin. Hetta er fyrstu ferð í trý ár, at framleiðsluloftið verður hækkað. Framleiðsluloftið ella kvotan svarar umleið til verandi framleiðslu hjá londunum. Tað var oljumálaráðharrin í Venezuela, Rafael Ramirez, sum kunngjørdi avgerðina á fundi í Wien. Semjan í OPEC kemur eftir drúgvar samráðingar millum tey 12 limalondini. Avgerðin hevur fingið oljuprísin at lækka mundandi. Hann var á middegi í gjár knappar 109 dollarar fyri tunnuna men er nú góðar 104 dollarar. Annars hevur prísurin ligið rættiliga stabilt leingi, hóast altjóða fíggjarkreppu og vánalig útlit á mongum økjum. OPEC-londini eru eisini vorðin samd um at lata formansskapin til Irak í 2012, eftir at Iran hevur átt formannin í eitt hálvt ár. Harvið verður tað irakiski oljumálaráðharrin Abdelkarim al-Luaybi, sum fer at stjórna felagsskapinumeftir nýggjár skrivar NTB.